## Øðrvísi gudstænasta á nátt



Vanligt er at fara í kirkju sunnumorgun, men nú verður møguleiki at fara í kirkju í kvøld á Glyvrum. Her letur nevniliga tann sonevnda "NÁTTARKIRKJAN" dyrnar upp í Glyvra kirkju. Náttarkirkjan, ið er ein øðrvísi og eksperimenterandi kirkja, vendir sær til ungdómin, men øll áhugaði eru vælkomin. Tað verður sangur, tónleikur, andakt, bønargonga og altargangur undir gudstænastuni. Høvið verður at tendra ljós í teirri serstøku ljóskolbuni. Ein náttcafé verður í forkirkjuni. - Náttarkirkjan á Glyvrum byrjar kl. 21, upplýsir sóknarpresturin, Meinhard Bjartalíð.

## Keypti The Independent fyri eitt pund

Russiski ríkmaðurin, Aleksandr Lebedev, tók ikki hendurnar so djúpt niður í lumma sín, tá hann um dagarnar keypti bretska blaðið, The Independent. Keypsprísurin var neyðars eitt pund. Við í keypinum var eisini sunnudagsblaðið, The Independent on Sunday. Fyrrverandi KGB-agenturin hevur við keypinum eisini bundið seg til at taka ábyrgd av allari skuld, sum blaðið kann koma í. Bæði bløðini høvdu eitt hall í fjør upp á næstan 250 miljónir krónur. Framtíðin hjá The Idependent hevur tað mesta av einum ári ligið í stórari óvissu.

# Met nógvar umsóknir til miðnámsskúlarnar

**So nógv fleiri fólk hava søkt inn á miðnámsskúlarnar í ár, at tað fer at kosta nakrar og tjúgu milliónir krónur meira í rakstri og lestrarstuðli. Samgongan er samd um, at pengarnir skulu finnast**

ÚTBÚGVING
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Nakrir hundrað fleiri umsøkjarar eru til miðnámsskúlarnar í ár enn í fjør, og hetta gevur bæði skúlum og Helenu Dam á Neystabø, landsstýriskvinnu høvuðbríggj.

Kunnu skúlarnir hýsa øllum hesum næmingum, og hvar skal peningurin finnast.

Serliga er tað HF í Hoydølum og HTX-útbúgvingin í Klaksvík, sum nógvar umsóknir eru til. So nógv hava søkt inn á HTX í Klaksvík, at har verða fyri fyrstu ferð tveir flokkar. Eisini eru væl fleiri umsóknir til studentaskúlarnar.

Av tí at talið av lærlingum er lækkað nógv, eru í staðin nógvar umsóknir til SIT, sum er støðisár innan tøkni, á teknisku skúlunum.

Ein orsøk er, at teir seinastu árgangirnir hava verið smáir, og at ein stórur árgangur nú søkir inn.

Men ein onnur orsøk er, at ungdómsarbeiðsloysið er stórt, og í staðin fyri at ganga fyri einki velja fleiri ung at fara í skúla.

Og tað heldur Helena Dam á Neystabø vera gott.

### Gott

- Hetta er ein góður máti at basa ungdómsarbeiðsloysinum, og vit varðveita ein størri part enn annars í landinum. Tað er ein betri íløga fyri samfelagið, at fleiri ung fara í skúla heldur enn at tey bara hava eina sosiala veiting at halla seg til. Hetta er eisini gott fyri okkara sjálvsvirðing sum tjóð, at vit taka ábyrgdina á okkum, sigur Helena Dam á Neystabø.

Rættiliga nógvar fleiri umsóknir eru til HF, og tað tulkar Helena Dam á Neystabø sum, at tilkomin fólk, sum antin eru arbeiðsleys ella vænta at verða uppsøgd, hava valt at fara í skúla.

Meira undirvísing á miðnámsskúlunum fer væntandi at kosta 10-12 milliónir krónur eyka, og haraftrat skulu gjaldast á leið sama upphædd meira í lestrarstuðuli.

### Samgongan samd

- Tíbetur er samgongan samd um, at útbúgving skal raðfestast høgt, so øll skikkað sleppa inn á skúlarnar, sigur Helena Dam á Neystabø.

Peningurin skal sostatt finnast onkrastaðni. Tað verður ikki á skúlaøkinum, tí tað økið er longu nógv skert. Heldur ikki er vist, at peningurin verður funnin aðrastaðni á mentanarøkinum. Upphæddin verður tikin uppí orðaskiftið um allar aðrar sparingar, sigur Helena Dam á Neystabø.

Ein stórur spurningur er, hvussu skúlin í Hoydølum skal kunna hýsa øllum hesum eyka fólkunum. Trongligt er sum er, og serliga nú gamli bygningurin er stongdur. Men tað er ein onnur søga.



*Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í skúlamálum er fegin um, at samgongan er sinnað at finna eyka peningin til miðnámsskúlarnar*

# Posta hevur stórt hall

**Hallið hjá Posta vaks úr 2,5 milliónum krónum í 2008 til 8,2 milliónir krónur í 2009. Ætlanin er at bøta úrslitið í ár og at fáa yvirskot næsta ár**

POSTUR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*




Árið í fjør royndist einki serligt hjá Posta.

Samlaða úrslitið eftir skatt hjá felagnum fyri 2009 var eitt hall uppá 8,2 mió. kr móti einum halli uppá 2,5 mió. kr árið fyri. Nevnd og leiðsla hava sett sær fyri, at rakstrarúrslitið fyri 2010 skal betrast í mun til 2009 og at raksturin skal geva avlop næsta ár.

Posta sigur, at við seinnapartsútberingini loyvir arbeiðstíðin, at yngri miðnámsskúlanæmingar í aldursbólkinum 18 ár til 23 ár kunnu starvast hjá Posta eftir skúlatíð, og hetta er sera fleksibul arbeiðsorka. Tilgongdin av yngri starvsfólki hevur havt stóra jaliga ávirkan á Posta, har nýggi dynamikkurin millum yngru og eldru starvsfólkini skapar synergi, stendur í ársfrágreiðingini.

### Fleiri frímerkjasavnarar

Posta sigur eisini, at tað leingi hevur verið sagt, at frímerkjasavnararnir fækkast í tali, og at skjótt verður eingin savnari eftir – men so er ikki, stendur í ársfrágreiðingini.

- Tvørturímóti leggjast ungir filatelistar afturat, men tað krevur eitt stórt og áhaldandi arbeiði fyri at fanga og røkja teirra áhuga, eins og hjá teimum tilkomnu, sigur Posta.

Í ársfrágreiðingini stendur eisini, at vinnulívið er ein megintáttur í virkseminum hjá Posta, og við einum fokuseraðum úrvali av tænastum hevur Posta seinasta árið sett greitt fokus á vinnulívið.

- Dentur hevur verið lagdur á at veita føroyskum fyritøkum og almennum stovnum eina effektiva og kostnaðargóða tænastu, ið hóskar til tørvin hjá einstaka kundanumm, sigur Posta millum annað í ársfrágreiðingini.

## Bilurin framvegis horvin

**Ein grønur bilur við merkinum Audi, sum stolin varð í Havn seinasta vikuskifti, er framvegis ikki komin aftur í aftur**

STULDUR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Seinasta vikuskiftið vórðu tveir bilar stolnir í eysturbýnum í Havn.

Tað gekk ikki long tíð, til annar bilurin varð funnin aftur á Oyrarbakka. Men hin bilurin er framvegis ikki funnin.

Politiið hevur leitað kring landið, men eingin bilur hevur verið at sæð.

Horvni bilurin er ein grønur bilur av merkinum Audi A4 1,8 árgang 1996.

Nummarplátan er DM 334.